

STÓRT BILBLAÐ
MIKUDAGIN 5. MAI



# Flaggdags-koyringin 2010

Tveir Jaguar XJS hjá ávikavist Dan Joensen á Argjum og Martin Heinesen í Hoyvík

## Flaggdagin, sunnudagin 25. apríl, var koyring og framsýning av ellisakførum í Havn



Citroën DS hjá Olivari Andreasen á Argjum



Bjarni í Stórustovu og Jákup Jacobsen eiga hendan Mazda 818



Julian Eliasen koyrdi við síni stóru Honda Goldwing motorsúkklu

Flaggdagskoyringin hjá Føroya Ellisakførum hevur verið eitt afturvendandi tiltak, síðan felagið varð stovnað í 1992. Hesaferð vóru nógv akfør við í tiltakinum, bæði motorsúkklur og bilar.

Ellisakførini koyrdu frá felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond í raðkoyring gjøgnum býin og oman á Kongabrúnna, har tey vóru sýnd fram, meðan flaggdagshaldið var á Vaglinum. Tá flaggdagshaldið var liðugt, bleiv koyrt til Effo-støðina í Gundadali, har ellisakførini eisini vórðu sýnd fram.



Julian Eliasen

## Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10

Í sendingini eru samrøður við nakrar av teimum sum koyrdu við ellisakførum flaggdagin. Samrøðurnar eru við Jákup Jacobsen um sín Mazda 818, Julian Eliasen sum sína Honda Goldwing motorsúkklu, Sverra Mortensen, sum vanliga koyrir fremst undir flaggdagskoyringini, og við Eirik Lindenskov um sín 80 ára gamla Ford A. Eisini eru samrøður við Tummas Paula av Reyni frá tryggingarfelagnum Trygd og við umboð fyri bilasølurnar um brúktbilamarknaðin á Skálatrøð.

Elna Høgenni og John A. Poulsen HOYVÍK





Eyðbjørg E. Antoniussen og Óli Nolsøe ARGIR

Matilda Sivertsen og Lucas B. Ceni TÓRSHAVN





Siri Johnsdóttir og Martin Mohr í Grund EIÐI/GØTA



Barbara Nielsen og Kim Roest TRONGISVÁGUR

Øll, sum atkvøða fyri vinnaraparinum eru við í lutakastinum um eitt gávukort frá SMS á kr. 1.000,-

sms

vinn eitt ATKVØÐUSEÐIL
brúdleyp

Fyll seðilin út og set ein kross í fýrkantin við tað parið, sum skal vinna eitt brúdleyp fyri uml. **kr. 38.000,-**

Navn innsendarans: Telefon nr.:

Ein atkvøðuseðil verður í Sosialinum hvønn dag til og við týsdagin 11. mai 2010. Ikki er loyvt at margfalda seðilin!
- Klipp beinleiðis úr blaðnum og send til:
**Sosialurin,** att: Brúdleypskapping, Postboks, 110 Tórshavn

Sosialurin

Sosialurin 341800